# Michael royndist stinnastur

**Mándagin var annað árið á rað skipað fyri teirri sonevndu Cop Cup, har løgreglufólk úr Føroyum dystast í ymiskum kendum og minni kendum ítróttargreinum. Vinnari gjørdist Michael Gram úr Sørvági**

LØGREGLUKAPPING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


*jTeir 20 luttakararnir, sum vóru við í Cop cup 2004*

Eins og í fjør var eisini onkur dani við í kappingini. Millum annað var vinnarin av kappingini í fjør, Asger Jørgensen úr Danmark, aftur við hesaferð, og eisini var navnframi tollarin, Jónleif Sólsker, við í kappingini.

### Gul føraratroyggja

Sum nakað nýtt í ár høvdu fyrireikararnir av Cop Cup 2004 skipað soleiðis fyri, at ein gul føraratroyggja var við í kappingini. Tann luttakarin, ið lá á odda samanlagt, slapp so at verða í gulu troyggjuni, meðan kappast var. Hetta er eitt fyribrigdi, sum er kent úr súkkluheiminum, har eitt nú gula leiðslutroyggjan verður nýtt í heimsins størstu súkklukapping Tour de France.

Eftir ætlan skuldu løgreglufólkini kappast í 18 ymiskum greinum, men av tí at tíðarætlanin ikki helt fult út, var gjørt av at strika hondbóltskappingina. Teir 20 luttakararnir kappaðust í eitt nú kendum ítróttargreinum so sum fótbólti, tennis, badminton og svimjing. Harafturat var eisini kappast í meiri ókendum ítróttargreinum so sum kast av dekkum, renna aftureftir, bowles og fjallarenning. Serliga hendan seinasta kappingargreinin, fjallarenning, vísir seg at verða ógvuliga krevjandi. Runnið varð niðan á eitt fjall, har tríggir kassar av sodavatn stóðu og bíðaðu eftir hvørjum einstøkum luttakara. Luttakararnir skuldu síðani bera allar tríggjar kassarnar runt um eitt ávíst øki, áðrenn greinin varð liðug.

### Michael basti Asger

Longu tíðliga í kappingini mánadagin legði Michael Gram úr Sørvági seg á odda og fekk gulu leiðslutroyggjuna. Vinnarin frá í fjør, danin Asger Jørgensen, var í hølunum á Michael, men tað eydnaðist tó løgreglumanninum úr Sørvági at halda tørn, og tá ið seinasta kappingin, sum var bowling, var liðug klokkan níggju mánakvøldið, kundi Michael Gram tí rópa seg vinnara av Cop Cup 2004.


*Løgreglumaðurin Michael Gram úr Sørvági vann ársins útgávu av Cop cup*

### Endaliga úrslitið í Cop Cup

| Nr: | Navn: | Stig: |
|---|---|---|
| 1. | Michael Gram | 253 |
| 2. | Asger Jørgensen | 244 |
| 3. | Jónleif Sólsker | 226 |
| 4. | Martin Hansen | 207 |
| 5. | Henrik Gram | 198 |
| 6. | Brynjer Johansen | 195 |
| 7. | Áki G. Olsen | 192 |
| 8. | Jákup Martin Joensen | 190 |
| 9. | Herbert í Lon | 186 |
| 10. | Eyðun Dalsgarð | 185 |
| 11. | Karl Oddmar Rasmussen | 173 |
| 12. | Peter Gram | 172 |
| 13. | Carsten Juul | 168 |
| 14. | Lars Müller | 164 |
| 15. | Jógvan Páll Joensen | 164 |
| 16. | Rani Wardum | 156 |
| 17. | Herman Brekku | 151 |
| 18. | Petur Heðin á Fløtti | 143 |
| 19. | Christian Hansen | 141 |
| 20. | Henrik Pedersen | 135 |

## Mjørkadals Ítróttarfelag skipaði fyri »MIF TOP RUN«

Leygardagin 4. septembur kl. 15.00 varð runnið MIF TOP RUN frá Statoilstøðini í Kollfjarðadali og niðan á Sornfelli. Nógvur mótvindur, nógv regn, mjørki og 9,8 km móti brekku. Tað var tað teir 50 rennarirnir skuldu standa í móti henda leygardag seinnapart. Hetta kundi tó ikki ræða teir hørðu »Toprennararnar«, sum høvdu valgt at brúka henda dagin til eina avbjóðing eitt sindur yvir tað vanliga.

Tað var Mjørkadals Ítróttafelag sum stóð fyri MIF TOP RUN fyri aðru ferð. Síðsta ár tann 6. september bleiv runnið fyri fyrstu ferð við 35 rennarum, sum má sigast vera eitt flott luttakaratal. Í ár valdu so 50 rennarir út av 57 tilmeldaðum at síggja tað ringa veðrið sum eina eyka avbjóðing. Allir 50 »Toprennarirnir« gjøgnumførdi renningina.

Í bólki 1 hjá monnum vann Hallur Holm frá Bragdinum við tíðini 46m 56m og í bólki 2 hjá monnum vann Regin Zachariasen, eisini frá Bragdinum við tíðini 47m 50s.

Í bólki 1 hjá kvinnunum vann Petra Hansen frá Kollafirði við tíðini 1t 01m 44s, meðan Jóngerð Høgnesen frá Bragdinum vann, í bólki 2 hjá kvinnum, við tíðini 1t 07m 46s.

Tey trð fyrstu í hvørjum bólki fingu heiðursmerki fyri teirra pláss, og teir fðra bólkavinnararirnir fingu eisini eina kontantviðursløn uppá kr. 500,00 hvør frá Føroya Banka.

Harafturat var lutakast um flottar vinningar so átta av rennarunum kundu taka ein flottan vinning heim við sær frá millum annað HD.fo, Hotel Hafnia og Trim Sport.

Biløt frá renningini kunnu síggjast inni á www.mjorkadal.com, har tað eisini kann lesast meira um renningina.



Gallarí Jinx

Mark Jiménez
Málningaframsýning í september

tel 317101 · jinx@jinx.fo

FORD MONDEO 1.8 TD

· Árg. 1998 · Km. 123.800 · Aircondition
· Hita í Setrum fr. · El-rútar fr. · Hita í forrúti
· El-spegl · Vetrardekk á felgum
· Sýnaður januar 2004
KR. 105.000,-
TEL 314198 / 223445

Til sølu
Fiat Scudo van

Árg. 1999 · Í sera góðum standi
Einans
Kr. 89.000,-
við MVG
Útgjald kr. 18.000,-
Restina práta vit um
Sí onnur tilboð á www.bilfridkan.fo
Bilfríðkan á Hjalla
Tel 35 73 00 ella 21 73 00
landsins lagaligasta brúktbilafígging

Kranaskeið D
8-25 TM
byrjar mikudagin 8. september kl. 19.15.
Tilmelding á **tlf. 318821** ella **218777.**
**Sp/f Koyrikortið**
**Slættanesgøta 5**

GER KVETTI
Opel Astra 1600 bíliga til sølu

Árg 97 · km. 85.000
Bilurin er í sera góðum standi og sera økonomiskur í brúki.
Til sølu vegna flyting
Áhugaði vinarliga ringi á tel 25 28 25 ella maila á gudny78@msn.com

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag
Uppstillingarfundur
2. og møguliga 3. uppstillingarfundur til kommunuvalið 2004 verður hóskvøldið 9. september kl. 20.00. Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9.
Øll eru vælkomin.
**Nevndin**

TILBOÐ
GALDANDI TIL 11. SEPTEMBER

GOSBAÐ
• Mát: 135 x 135cm, 294 ltr
• Við 8 jetdysum
BERT 8.598,-
spar 2.400,-

SPEGLGLAS-SKJÓTIHURÐAR
• Breidd 120 cm. samlað
• Hædd 226 cm.
NÚ 1.198,-
spar 800,-

Laminatgólv
• Easy snap system
• Ahorn ella bók
BERT 68,- pr. $m^2$

BEKO 20 T58
• 20" sjónvarp
• v/tekstvarpi og fjarstýring
BERT 1.998,-

INDESIT G74 turkitrumla
• Tekur 5 kg
• Mekanisk stýring
BERT 1.998,-
spar 700,-
damor
KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 315415 • FAX 319001

Handil til sølu
Ein væluppbygdur handil við meturvørum o.ø. og við stórum, føstum viðskiftafólkið, í miðjuni í Tórshavn, til sølu um nóg høgt boð fæst.
Skriva til Sosialin, Box 76, 110 Tórshavn.
**Bill.mrk. 170**